# *E - og tónleikurin*



**Birgir Kruse**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Tað vil eg ikki siga, men eitt elektriskt orgul høvdu vit einaferðina. Spældi onkrar sálmar á tað. »Ongum er so trygt at fara« til dømis.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Eg haldi, eg má svara nei uppá handan spurningin. Trummur í Eiðis Ljómfelag vil eg ikki ordiliga telja við.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Nei. Men skrúvi wc-útvarpið hart frá. Og leggi onkuntíð eina fløgu á.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Man ikki tað? Sum tannáringur við bløðunum Go! og Vi Unge? Ájú.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Rættuliga nógv. Vil siga, at eg lesi yrkingar gjøgnum tónleik. Tónleikur er mítt bókmentunarliga filtur. Rokklyrikkur. Inngongdirnar eru til dømis Hank Williams og David Bowie. Men eisini danskarar sum C.V. Jørgensen og Love Shop.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Eini 3000 fløgur og kanska 1000 LP plátur. Og nakrar single plátur í nøkrum flower power mappum.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– Tað broytist alla tíðina. Ein fløga, sum eg ofta vendi aftur til eru sálmar við norska yrkjaranum Edvardi Hoem. Hildegunn Riise syngur saman við einum russiskum kóri úr Heilaga Andans Kirkju í Moskva. Upptøkan er gjørd við DAT bandupptakara eftir einari nátt - akkurát ta náttina í oktober 1993, tá undantaksstøða var og hernaðarvagnarnir rulla inn í Moskva. 14 dagar seinni varð fløgan á gøtuni undir heitinum »Den fattige Gud«. Skrúvar tú hart frá, kanst tú hoyra hernaðarvagnarnar í gøtunum. Eitt statement!

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– »Kramgoda låtar« við Vikingarna.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Brúdleypið í Kána, Veronica, Blue Hawaii, Jag trodde englarna fanns - teir eru fleiri. Og ikki minst danskir veitslusangir. Hvat hugsa tey fyri sær? Á bláman við øllum donskum veitslusangum!

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Hallmark, MCPS, K-Tel og líknandi útgávur, sum eru desiderað feilkeyp í altjóða lufthavnum, tí góðskan er aldri í lagi, og røttu nøvnini aldri luttaka. Pínligt at uppdaga, at við smáum stavum stendur okkurt sum »At least one of the original members is participating« ella okkurt sovorðið. Keypið aldri fløgur uppá tilboð í lufthavnum!

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– He'll Have to Go.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Tað veldst um fólkið. Southstate blues við Allman Brothers, Jeff Healey og Stevie Ray Vaughn í onkrum føri. Deep Purple in Rock og Aqualung um tað eru Jóan Petur og Kartni. David Olney og Lefty Frizzell, um tað er countryklubbin. Walkers og Middle of the Road er eisini stuttlig at draga fram av og á.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Ongan.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Einsíðugt motoriskur dansitónleikur í strekkmarsj við ferðandi bíligum skandinaviskum dansiorkestrum, sum brúka strings og stórar flippur. Legg merki til, at hetta er ikki galdandi fyri Sven Ingvars. Teir eru tann ektaða vøran. Alt hitt eru efturapingar. Dansistøð taka lívið av tónleikinum.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Eingin. Mín tónleikur er til invortis brúk.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– Something's happening við Herman's Hermits.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
– Tað kann bara verða í einum føri. Tað er at gera Hank Williams atkomiligan á enn einum máli - føroyskum.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
- ...qué? Long Black Veil, kanska?

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Paul McCartney í Parkini herfyri.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Pete Townshend og havt samrøðu við hann. Fyrsti spurningur: Hvat meint tú við, tá tú skrivaði "I hope I die before I get too old"? Annar spurningur: How old are you now?

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Kirsti Dee Hansen, Gøteborg, Kirsti.Hansen@svenska.gu.se
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Vísindafestival

Í hesum døgum er vísindafestivalur í Gøteborg í samfullar níggju dagar. Tað er m.a. lærdi háskúlin í Gøteborg og Vísindaráðið, ið skipa fyri. Hetta er sjeynda árið á rað, at skipað verður fyri einum líknandi festivali, har fleiri hundrað granskarar siga frá, og túsundavís av forvitnum fólki leita sær inn til býin at lurta og læra um IQ og EQ.

Í ár ber festivalurin heitið: "Vísindi, kærleiki og forstáilsi", og kærleiki er ársins boðskapur. Tað eru ikki færri enn 200 punkt á skránni um kærleika. Nøkur av hesum bera heitið: Mál og kærleiki, Tónleikur og kærleiki, Hvar ert tú mín elskaða? Um kærleika á netinum, Hevur kærleikin bæði eina góða og eina ónda síðu? Kærleiki, list og kreativitetur, Tað strongda hjartað, Tann kærleiksfulla skipanin, Arbeiði, hugur ella disiplinering, Kærleiki, kemi, mussar og kórsangur, Man tað løna seg at mussa ein frosk? Hesin lítli brotpartur av heitum siga okkum nakað um, hvussu kærleikin verður lýstur.

Í alt eru 500 tiltøk á skránni og tey eru spjadd um allan býin, eins og lærdi háskúlin, ið húsast á 24 støðum í býnum. Tó eru tey flestu tiltøk í miðbýnum.

Tvey undirheitir eru á festivalinum, nevniliga ’orka’ og ’vert at vita’. Heitið orka verður m.a. lýst soleiðis: Hvat er tað, tú etur? Hevur kjarnorka nakra framtíð — heima og úti í verðini? Alternativ til kjarnorku, Ávirkast veðurlagið av okkum menniskjum? Sólarbýurin Gøteborg 2050. Hitt undirheitið, vert at vita, rúmar hópin av upplýsandi fyrilestrum sum til dømis: 50 ár við DNA, Tann heilaga Birgitta 700 ár, Bøn og meditatión, Brennandi ella útbrend? Dansur, sangur og polsk tónleikasøga, Hvat er kenslur fyri nakað? Viagra í dag, hvonn ígjár, Telduverðin — hvar gongur markið?

Á skránni eru eisini filmar, sjónleikir, tónleikur, kjak og workshops. Fleiri tiltøk eru beinleiðis ætlað fyri børn, ung og familjur. Ein serstøk skrá er løgd til rættis fyri skúlarnar, og í ár luttaka yvir 30.000 næmingar og lærarar í sokallaði skúlaskránni. Festivalurin hevur skipað fyri einum ’Eksperimentverkstaði’ og einum ’Fysik- og lasershowi’, har næmingarnir kunnu royna seg á ymiskan hátt.

Ætlanin við Vísindafestivalinum er m.a. at opna dyrnar á lærda háskúlanum, koma út til fólk og at fáa fólk at koma innar. Man ynskir at stimbra forvitnið og tráanina eftir at læra. Eitt mál er eisini at geva íblástur og geva luttakaranum møguleika at seta fram spurningar. Aftanfyri tiltakið liggur hetta at læra fyri lívið. Vit liva í dag í einum samfelag, ið krevur, at einstaki borgarin er í støðugari menning. Tað er ikki longur nokk at taka eina útbúgving, fáa eitt fast arbeiði og seta seg afturá. Flestu arbeiðspláss og arbeiðsfunktiónir krevja áhaldandi útbúgving og menning m.a. av tøknifrøðiligum og av kappingarligum ávum. Fylgir tú ikki við, verður tú afturúrsigld innan stutta tíð, missir kanska arbeiðið og fært trupulleikar við at finna eitt nýtt arbeiðspláss. Tað er tí neyðugt, at samfelagið og einstaka arbeiðsplássið stimbra sítt fólk at læra fyri at kunna kappast við onnur. Ein vegur at økja menningarhugin, er, at gera ein vísindafestival. Hevur tú hug at kunna teg meir, kanst tú vitja inn á heimasíðina hjá teimum: www.goteborg.com/vetenskaps festival



**UTTAN ÚR HEIMI**

# Fleiri yvirgangsatsóknir í væntu



*Amerikanarar ávara um, at sjálvmorðsbumbuatsóknin í Riyadh var bara tann fyrsta í einari røð. Vandin fyri øðrum atsóknum er serliga stórur í Miðeystri, Asia og Afrika*

**Amerikanarar ávara um, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda ætlar at søkja at málum í Miðeystri, Asia og Afrika**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Amerikanska stjórnin hevur flutt teir flestu av sínum diplomatum úr Saudiarabia aftan á sjálvmorðsbumbuatsóknina í Riyadh, og í øðrum londum hava amerikansku sendistovurnar fingið boð um at fyrireika seg til nýggjar atsóknir frá al-Qaeda.

Amerikanarar ivast ikki í, at atsóknin í saudiarabiska høvuðsstaðnum var tann fyrsta í einari røð av atsóknum, sum al-Qaeda hevur lagt til rættis fyri at vísa, at felagsskapurin er førur fyri at skipa fyri slíkum atsóknum, hóast hann er viknaður munandi síðani 11. september í 2001.

Í Washington verður hildið, at vandin fyri atsóknum er serliga stórur í Miðeystri, Asia og Afrika, tí her er tað serliga trupult at verja amerikanskar ríkisborgarar, sjálvt um teir vanliga búgva saman í býarpørtum eins og í Riyadh. Millum annað verður stúrt fyri atsóknum í londum sum Malaysia og Kenya, og uttanríkisráðið í Washington hevur mælt amerikanarum frá at fara hagar.

Samstundis fýlast amerikanarar á, at myndugleikarnir í Saudiarabia vóru ov seinir at taka neyðug stig, tá USA herfyri ávaraði teir um, at yvirgangsmenn ætlaðu at fremja eina atsókn. Millum annað hevði USA biðið Saudiarabia økja vaktarhaldið í býarpartinum, har flestu útlendingarnir búgva, men tað bleiv ikki gjørt.

USA sendi mikudagin nakrar serfrøðingar hjá FBI at hjálpa saudiarabisku løgregluni at avdúka, um tað var al-Qaeda, sum skipaði fyri atsóknini í Riyadh. Men eisini her stungu trupulleikar seg upp, tí tá FBI-serfrøðingarnir mikukvøldið skuldu fara umborð í eitt flogfar í Týsklandi, máttu teir setast aftur, tá innferðarloyvi teirra til Saudiarabia vóru ikki avgreidd.

# Ætla at »fría« Kuba við frælsi

**Seinastu tíðina eru viðurskiftini millum USA og Kuba versnað nógv. Nú siga nakrir amerikanskir kongresslimir, at táttandi tiltøk gera bara ilt verri, og at fult samstarv er tann rætti vegurin fyri at fáa stýrið hjá Castro frá**

USA/KUBA
*Árni Joensen:*

Í meiri enn 40 ár hevur USA roynt at kvala stýrið hjá Fidel Castro á Kuba, men handilstiltøkini hava havt øvugta ávirkan og hava styrkt stýrið á karibisku oynni. Tiltøkini hava gjørt, at kubanararnir geva USA skyldina av øllum tí illa, og tað hevur gagnað Castro.

Nú halda nakrir kongresslimir í Washington, at USA hevur rikið ein skeivan politikk ímóti Kuba. Í einum uppskotið, sum hevur til endamáls at styðja demokratiseringsrørslur á Kuba siga kongresslimirnir, at tað einasta, sum kann taka beinini undan stýrinum hjá Castro, er fult samstarv. Millum annað mæla teir til at lata amerikanarar í stórum tali vitja Kuba. At skerja sambandið og at forða fyri samhandli er at lata Castro stýra gongdini, siga teir, og teir mæla tí kongressini til at seta øll handilstiltøk ímóti Kuba úr gildi.

Amerikanska stjórnin fordømdi Kuba í síðsta mánað, tá tríggir menn, sum høvdu rænt eina ferju, sum teir ætlaðu sær til USA við, vórðu avrættaðir. Mikudagin vórðu 14 kubanskir diplomatar koyrdir úr USA og skuldsettir fyri njósning. Samstundis hevur stjórnin avmarkað ferðamøguleikarnar millum USA og Kuba.

Republikanski umboðsmannatinglimurin Jeff Flake úr Arizona og demokratiski senatorurin Max Baucus úr Montana, sum eiga uppskotið um at seta øll handilstøk ímóti Kuba úr gildi, siga, at seinastu tiltøkini hjá Bush-stjórnini gera bara ilt verri og skerja møguleikarnar hjá teimum kubanum, sum vilja hava størri demokrati.

## Túsundtals danir missa arbeiðið

Arbeiðsloysið í Danmark hevur verið veksandi tað seinasta árið, og nýggjar framrokningar vísa, at uppaftur fleiri fólk fara at missa arbeiðið í næstum.

Í vikuni boðaði stóra telefelagið TDC frá, at har verða 1650 fólk uppsøgd, og SAS hevur eisini boðað frá nógvum uppsagnum. Samstundis vísir tað seg, at ídnaðarvirkini hava ikki havt tað framgongd, sum tey høvdu roknað við, og at tær tí verða noyddar at koyra nógv fólk til hús.

Eitt kanning, sum Jyllandsposturin hevur gjørt, vísir, at umleið 10.000 fólk á stórum ídnaðarvirkjum kunnu vænta at missa arbeiðið í summar. Uppsagnirnar fara samstundis at bera í sær, at nógv smá virkir, sum gera ymisk arbeiði fyri tey stóru virkini, verða noydd at koyra fólk til hús.

## Ókendur maður forseti

Ætlanin var, at argentinar skuldu velja sær nýggjan forseta sunnudagin, men tað verður av ongum, tí fyrrverandi forsetin, Carlos Menem, valdi at taka seg aftur sum valevni.

Avgerð hansara ber í sær, at hitt valevnið, tann 53 ára gamli Nestor Kirchner, tekur við forsetaembætinum. Hann er guvernørur í einum landsparti, men var at kalla fullkomiliga ókendur í Argentina, til fráfarandi forsetin, Eduardo Duhalde, bað hann stilla upp. Kortini eydnaðist tað honum at fáa næstflestar atkvøður í fyrra valumfarinum, og seinastu dagarnar hava veljarakanningar víst, at hann hevði fingið umleið 60 prosent av atkvøðunum, hevði seinna valumfarið verið sunnudagin sum ætlað.

Men uppgávan hjá nýggja forsetavum verður alt annað enn løtt. Argentina hevur ovurhonds stórar búskapartrupulleikar, og meiri enn helmingurin av fólkinum livir á fátækramarkinum.

## Njósnarar fyri rættin

Ein dómstólur í Stockholm viðger í hesum døgum eitt sakarmál ímóti trimum svium av iranskum uppruna, sum eru ákærdir fyri njósning.

Teir tríggir menninir vórðu tiknir í november í fjør. Málið vakti stóran ans, tí tað elvdi til, at svenska uttanríkisráðið gav tveimum russiskum diplomatum boð um at fara av landinum alt fyri eitt. Myndugleikarnir vildu vera við, at teir tríggir menninir av iranskum uppruna høvdu latið russisku diplomatunum loyniligar upplýsingar um ymsa framleiðslu hjá stóru fyritøkuni Ericsson.

Tann høvuðsákærdi í málinum, Afshin Bavand, arbeiddi hjá Ericsson, til hann varð uppsagdur í august í 2001. Verður hann funnin sekur, kann hann fáa lívlanga fongsulsrevsing, skrivar svenska tíðindastovan TT. Hinir báðir kunnu fáa seks ára fongsul.

## Eiga at selja SAS

Norski vinnumálaráðharrin, Einar Gabrielsen, heldur, at norski staturin eigur at selja sín part av partabrøvunum í skandinaviska flogfelagnum SAS.

Norski staturin eigur 14 prosent av SAS. Við blaðið Aftenposten sigur Einar Gabrielsen, at tað er ikki tíðarhóskandi longur, at tað almenna er partaeigari í flogfelagnum, og tí eigur staturin at selja sín part, sigur hann. Hinvegin heldur hann ikki, at tíðin er búgvin enn, men at tað gongur tann vegin.

Norski vinnumálaráðharrin sigur, at hann ætlar sær ikki at nýta eigarapartin til at ávirka leiðsluna í skandinaviska flogfelagnum, men at hann sjálvandi nýtir hetta høvið til at greiða frá sínum sjónarmiðum. Sjálvan raksturin leggur hann seg ikki útí, tí SAS skal sjálvandi rekast á handilsligum grundarlagi.